

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 01 - 2012

# Statoil stórt oljufund í Barentshavinum

Statoil hevur saman við ENI og Petoro gjørt eitt stórt oljufund í Barentshavinum. Talan er um Havis kelduna, sum liggur tætt við Skrugard fundið, ið Statoil gjørdi í fjør. Brunnurin varð boraður við boripallinum Aker Barents. Fyrstu metingarnar av støddini á fundinum eru 200 til 300 milliónir tunnur av olju og gassi. Saman við Skrugardfundinum verður roknað við, at hesi bæði fundini tilsamans eru uppá meira enn eina halva milliard tunnur. Havis er næsta stóra fundið vit hava gjørt í Barentshavinum seinastu níggju mánaðirnar. Við hesum báðum fundunum kann man siga, at vit hava veruliga fingið ein nýggjan oljulandslut í Barentshavinum, sigur ovasti stjórin í Statoil, Helge Lund. Havis liggur 7 kilometrar í útsynnimng úr Skrugard fundinum, sum varð gjørt í apríl í fjør. Helge Lund sigur víðari, at seinasta fundið er ein ásannan av, at tann trúgv og strategi, sum Statoil hevur havt um møguleikarnar á norska landgrunninum, hava verið røtt. Hesi bæði fundini í Barentshavinum staðfesta eisini, at tað gevur úrslit at hava tol og arbeiða langsiktað. Statoil hevur gjørt kanningar í Barentshavinum í 30 ár og hevur verið við í 88 av íalt 92 leitibrunnum, sum eru boraðir í hesum økinum. Henda leitingin hevur givið felagnum størri innlit og vitan um økið. Tey bæði fundini í Barentshavinum fara at skapa nýggjar møguleikar hjá oljuídnaðinum í Noregi og fara at geva arbeiðspláss og hava positiva avleiðingar fyri alt norðurøkið, sigur Helge Lund. Statoil eigur 50% í fundinum, Eni 30% og Petoro 20%.

